## Ikki sparingar frá fíggjarnevndini



Fríggjadagin siteraði Sosialurin Rósu Samuelsen fyri at siga, at 6,5 milliónir krónur vóru spardar til eldrarøkt í ár. Hetta er ikki heilt rætt. Tí er talan um pening, ið manglaði í fjør, hetta hevði við sær, at tørvurin á røktarøkinum er vorðin so stórur, sum hann er í løtuni. - Eg hevði trupult at skilja, hví tørvurin nú var blivin so stórur, og tí spurdi eg eftir upplýsingunum, sigur Rósa Samuelsen. Hetta vil við øðrum orðum siga, at peningurin, ið var nevndur at skula vera í ár, í veruleikanum var í fjør.

## Bátahylurin í Hvalvík fingið verjugarð

Sunda kommuna hevur lagt ein verjugarð uttan um sunnara partin av bátahylinum í Hvalvík. Tann nýggi verjugarðurin fer at gera, at bátarnir kunnu liggja tryggir har í øllum veðri. Frammanundan hava trupulleikar verið, serliga tá hann hevur ligið av landnorðingi. Tað skrivar Sunda kommuna á heimasíðuni. Tá alt arbeiðið er liðugt, fer at verða pláss fyri einum 30 bátum afturat í bátahylinum. Grótið, ið verður nýtt til verjugarðin, kemur frá Eiði 2 verkætlanini hjá SEV. Har verður nú borað frá tunnilsmunnanum við Norðskála og norður til Svínáir. Tað eru sera stórar mongdir av gróti, ið koma burtur úr hesum arbeiði. Sunda Kommuna hevur gjørt avtalu við SEV um at taka ímóti 100 túsund tonsum av gróti, sum umframt til bátahylin í mestan mun verða brúkt til at víðka um havnaløgini í Hvalvík og á Oyri, skrivar kommunan.

# Full fólk og brotnir rútar

**Vikuskiftið royndist hampiliga friðarligt hjá løgregluni. Bert okkurt smávegis herverk og nøkur full fólk máttu teir taka sær av**

POITIRAPPORTIN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Okkurt herverk varð framt um vikuskiftið, millum annað var ein rútur brotin á Gamla Apoteki, men talan var kortini ikki um innbrot*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Mest øsandi hendingin um vikuskiftið var helst, tá sløkkiliðið varð boðsent út á Argir, tí fólk boðaðu frá royki úr einum húsum.

Tað vísti seg kortini, at tala var um eina grýtu, sum stóð og kókaði, og fólkið í húsunum hevði gloymt hana. Hetta elvdi til nógvan royk, men tað var eisini alt.

Annars var tað nokk ferðsluløgreglan, sum hevði mest at gera. Fríggjadagin tók hon tveir fyri at koyra uttan koyrikort, og sama dag gjørdu teir ferðslukanningar í Vágatunlinum. Har vórðu fimm bilførarar tiknir fyri at koyra ov skjótt, og tann, sum koyrdi skjótast, koyrdi við 137 km/tíman. Hann misti koyrikortið á staðnum.

Eisini vórðu trý full fólk tikin upp fríggjakvøldið og koyrd til hús.

Okkurt smávegis herverkið varð eisini framt um vikuskiftið. Um hálvgum fimm tíðina leygarmorgunin tók løgreglan ein 19 ára gamlan mann fyri at sparka á ein bil í Tórsgøtu. Maðurin rann av staðnum, men slapp kortini ikki undan løgregluni, sum handtók hann og skuldsetti hann fyri herverk.

Í einum øðrum føri hevði ein maður gingið á takinum á einum bili. Eingin er enn handtikin fyri tað herverkið, men av politistøðini verður sagt, at teir hava nøkur spor at ganga eftir.

Sunnumorgunin var eitt annað herverk framt, tá onkur hevði tveitt eina fløsku inn gjøgnum eitt vindeyga í miðbýnum, og somuleiðis fekk løgreglan fráboðan frá húsavørðinum í løgtinginum um, at ein rútur var brotin á Gamla Apoteki. Talan var kortini ikki um innbrot.

### Hálka Millum Fjarða

Sunnumorgunin vóru tveir mans eisini farnir til hendurs uttan fyri kioskina við Steinatún. Teir verða nú skuldsettir fyri brot á politiviðtøkurnar. Og í einum øðrum føri varð løgreglan boðsend til húsaófrið í Havn, men har eydnaðist tað at tosa partarnar til sættis.

Umframt tað var bert talan um trý full fólk, sum løgreglan tók upp sunnumorgunin. Ein varð koyrdur til hús, ein kláraði seg sjálvan, meðan hin triðji svav rúsin av sær á politistøðini.

Eisini runt um landið hevur verið friðarligt, og bara eitt ferðsluóhapp í Suðri varð fráboðað. Talan var um rúsdrekkakoyring.

Eisini inni í Eysturoynni hendi eitt ferðsluóhapp. Hetta hendi beint fyri klokkan hálvgum sjey í morgun, áðrenn løgreglan møtti á politistøðini í Runavík. Tí vóru teir heldur ikki á staðnum.

Ein bilur við teimum monnum var á veg suður til Havnar, tá óhappið hendi, og bilurin fór út av vegnum.

Sjúkrabilur varð boðsendur, og flutti teir báðar menninar, sum vóru í bilinum, á Landssjúkrahúsið. Annar hevði fingið eina skrammu í pannuna, og talan var eisini um pínu í ryggi og lendum. Hin yngri maðurin fekk ongan snudd.

Tað var hálka, sum var orsøkin til óhappið.

# Aliráðstevna á Hotel Førum

**Aliráðstevnan 2009 verður 27. februar á Hotel Føroyum. Nevndin í Havbúnaðarfelagnum leggur stóran dent á, at aliráðstevnan skal verða viðkomandi fyri starvsfólkini í alivinnuni og tær avbjóðingar, sum vinnan dagliga møtir**

ALIRÁÐSTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Árliga aliráðstevnan, sum Vinnuhúsið skipar fyri, verður á Hotel Føroyum 27. februar.

Eins og undanfarin ár verða tveir fastir tættir á skránni. Hugt verður eftir marknaðarútlitunum hjá alivinnuni komandi árið, umframt at lívfrøðiliga gongdin í føroysku alivinnuni verður gjørd upp. Tað eru ávikavist Hans Jákup Mikkelsen frá Marine Harvest og Rúni Dam frá Avrik, sum hava framløgurnar.

Eisini verða fleiri útlendskir gestir við á aliráðstevnuni. Cato Lyngoy, djóralækni, sum í nógv ár hevur arbeitt innan sjúkufyribyrging í Noregi, fer at greiða frá, hvussu fiskasjúkan PD smittar. Somuleiðis fer granskingarleiðarin frá norska granskingarstovninum Nofima, Grete Bæverfjord, at greiða frá kritiskum faktorum í sambandi við framleiðslu av rognum og smolti.

Frode Oppedag, granskari frá norska Havforskningsin stituttinum, fer at greiða frá yvirvøku av ilt í aliringum og hvussu týdningarmikið tað er við nóg mikið av ilti. Martin Iversen frá Høgskolen í Bøde fer at greiða frá strongd í sambandi við útseting av smolti.

Aðrir fyrilestrahaldarar verða Jan Sørensen frá Biofar og Durita Nielsen, granskari, frá Luna. Jan Sørensen fer at greiða frá umhvørvinum við alibrúkini, og Durita Nielsen, sum í løtuni er við at gera eina kanning av góðskuni á føroyskum laksi, fer at legga úrslit frá hesi kanning fram.



*Grete Bæverfjord verður ein av gestunum á aliráðstevnuni hjá Vinnuhúsinum*

Jóhan Dahl, landsstýrismaður í alimálum, setir dagin, skrivar Vinnuhúsið á heimasíðu síni.